*Heimahjálparaverkfall*

# Heimahjálpin hart rakt frammanundan

*Landsstýrið hevur ábyrgdina av, at tey sjúku og gomlu í samfelag okkara verða slept upp á fjall*

Á midnátt týskvøldið fóru allar heimahjálpirnar í landinum í verkfall eftir at lønarsamráðingarnar millum Heimahjálparafelag Føroya og landsstýrið slitnaðu úrslitaleysar.

Hetta førdi við sær, at tey hjálparleysu í samfelag okkara og tey gomlu, ið eru ringast fyri, ikki fingu vitjan av heimahjálpini í gjáramorgunin.

Fyri at hjálpa sum frægast uppá støðuna, heitti Heimahjálpin á heilsusystrarnar í teim ymsu kommunum og eftirlitskvinnunum í felagnum um at hjálpa til, so óhjálpin fólk fingu lívsneyðuga hjálp.

### Neyðhjálp

Skipað var somuleiðis fyri, at tey álvaraligastu vóru flutt á røktarheim. Og tað var longu gjørt fyrrapartin í gjár.

Undir teimum lønarsamráðingum, sum umboð fyri Heimahjálparafelag Føroya høvdu við landsstýrið, áðrenn samráðingarnar slitnaðu, gjørdu heimahjálparnir landsstýrinum greitt, at tær vóru farnar so nógv niður í løn við tað, at tímatalið er minkað so mikið nógv, at tær ikki kundu fara longur niður í løn.

Til hetta segði landsstýrið, at um heimahjálpirnar fóru niður í løn, sum landsstýrið kravdi, so kundu arbeiðstímarnir fara upp. Soleiðis at tað, sum eftir er av játtanini til Heimahjálpina, kann nýtast til at geva fleiri tímar.



Jákup í Gerðinum, semingsmaður

Men hetta vildi Heimahjálparafelag Føroya ikki ganga við til undir nøkrum umstøðum.

### Heimahjálpin bíðar

Av somu orsøk var ikki møguleiki fyri nakrari semju millum partarnar, upplýsir semingsmaðurin, Jákup í Gerðinum, sum eisini hevur sagt seg vera at hitta, um partarnir hava okkurt nýtt at bjóða, sum kann gera, at umboðini kunnu seta seg til samráðingarborðið av nýggjum.

Heimahjálparafelag Føroya hevur boðað frá, at tað ikki ætlar at rætta hond frá síðu, tí tað má verða landsstýrið, ið eigur útspælið.

Sum er, er Heimahjálparafelag Føroya rakt av verkbanni, ið merkir lock out.

Aðra staðni inni í blaðnum í dag hava vit eitt bræv, ið Heimahjálparafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag hava sent løgmanni, Maritu Petersen.

Haraftrat er tíðindaskriv frá Heimahjálparafelagnum og Arbeiðarafelagnum um gongdina í samráðingunum við landsstýrið at síggja inni í blaðnum.

B.

# Lágir prísir hótta oljuøkini

*Bara helvtin av norsku oljuøkjunum kunnu klára seg, sigur Harald Norvik, stjóri í Statoil*

**Sambært norskum bløðum var ongin, ið tordi at hugsa um at framtíðar ráoljuprísir fóru at geva yvirskot, fyrr í ár. Og líkt er til, at fatanin er á leið tann sama nú vit eru farin inn í seinnu helvt av 1993.**

Norsku bløðini vísa á, at oljufeløgini skulu hava minst 10 prosent í vinningi av íløgum – aftaná at skatturin er goldin.

Eitt yvirlit, ið Statoil hevur gjørt, vísir at miðalprísurin fyri fatið av ráoljuni í 1992 bert var einar 19 US dollarar. Havast eigur í huga, at oljuøkini skulu hava millum 120 og 150 norskar krónur fyri fatið.

Kanningin vísti, at fleiri av teimum norsku oljufeløgunum ikki kláraðu seg við undir 100 norskum krónum. Men oljufelagið Gullfaks Vest klárar seg sjálvt við 20 norskum krónum fyri fatið.

Stjórin í Statoil heldur, at hesar kanningar vísa á, at oljufeløgini mugu gera okkurt við hetta.

Harald Norvik heldur, at málið er at tilvirka so nógva olju sum møguligt, og selja hana fyri ein góðan prís.

em



Mynd: Dimmalætting

**BLAÐSTJÓRI Á VITJAN.** Síðani fríggjadagin hevur fyritaks- og ábyrgdarblaðstjórin á dagblaðnum »Vejle Amts Folkeblad«, Vagn Nygaard og frú, verið í Føroyum, og hava tey ferðast víða um norðanfyri í oyggjunum og kunnað seg um og notið stórslignu og vøkru náttúruna t.d. á Viðareiði og við Gjógv. Týsdagin hitti blaðstjórin ymsar politikarar í Havn, og tá vitjaðu blaðstjórahjúnini eisini inn á »Dimmalætting« at síggja blaðhúsini. »Vejle Amts Folkeblad« er eins og »Dimmalætting«, sum tók nýggju blaðhúsini í nýtslu í 1985, flutt úr miðbýnum í nýggj blaðhús á ídnaðarøkinum í útjaðaranum á Vejle í 1989, og Vagn Nygaard var hugtikin av, hvussu nógv innrættingin av blaðhúsunum mintu hvørt um annað, sjálvt um munur er á støddini – hjá teimum starvast um 185 fólk, á »Dimmalætting« 25.
Her eru donsku blaðstjórahjúnini avmyndað saman við blaðstjóra »Dimmalætting«-ar á ljósu loftsgongini.

fk dr. jakobsensgøta fk

**Rimmar útsøla**
**við summarblómum úr urtagarðinum í Kirkjubø!!!**

Dømi:
bakki við 4 plantum: 20,00

Komið og síggið øll hini rimmar-tilboðini:

- ✓ Summarblómur
- ✓ Blómur í heingipottum
- ✓ Grønmetissmáplantur
- ✓ Staudur
- ✓ Runnar: Ribes/Íslandspílur
- ✓ Trø v.m.

Fríggjadagin 25.7. frá kl. 15,00 og leygardagin 26.7. frá kl. 10,00 er fólk frá Urtagarðinum í Kirkjubø til staðar at leiðbeina viðskiftafólkunum á torginum frammanfyri FK í Dr. Jakobsensgøtu. Nýtið henda møguleika !!!

fk
í Dr. Jakobsensgøtu
TLF 11320

fk dr. jakobsensgøta fk dr. jakobsensgøta fk